Bjarni Djurholm:

# Eg havi onki skeivt gjørt

**Bjarni Djurholm heldur ikki at hann hevur gjørt nakað skeivt og hann heldur ikki, at hann er lopin í ryggin á Atlantsflogi**

LOFTFERÐSLA

Áki Bertholdsen
*aki@sosialurin.fo*

- Eg havi ikki gjørt nakað skeivt.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, vísir púra avgjørdur skuldsetingum frá tjóðveldisflokkinum, aftur.

Sum landsstýrismaður í vinnumálum er Bjarni Djurholm umboð fyri partaeigaran í Atlantsflogi, sum er landskassin og sostatt Føroya Fólk.

Og tað er lopin nógvum fyri bróstið, at hann hevur alment sagt, at hann hevur heitt á almennu umsitingina um at brúka Faroe Jet.

Í Sosialinum í gjár helt nevndarformaðurin í Atlantsflogi, at tað tóktist løgið, at partaeigarin í einum felag heitti á sítt bakland um at brúka kappingarneytan.

Og hetta er eisini fallin tjóðveldisfólki fyri bróstið, tí í Løgtinginum í gjár vildu tey hava løgmann at svara um hann helt, at Bjarni Djurholm umsat sítt málsøkið á fullgóðan hátt og røkti sínar skyldur eftir lógini um ábyrgd landsstýrismanna.



*- Vit eiga ikki at brúka pengarnar hjá skattgjaldarunum óneyðugt og tað er ikki meiri enn rímiligt, at vit brúka Faroe Jet, har tað er ein fyrimunur og tað havi eg tosað við Landsstýrið um, sigur Bjarni Djruholm*

Men Bjarni Djurholm heldur fast við, at hann hevur onki skeivt gjørt og hann heldur ikki, at hann er lopin í bakið á Atlantsflogi.

- Tað einasta, eg gjørdi var, at gera landsstýrið vart við, at vit hava tvey feløg og har tað var ein fyrimunur at brúka Faroe Jet, eiga vit ikki at velja tað frá.

- Tað er óvanligt, taka slíkt fram á landsstýrisfundi, men tað gjørdi eg og vísti til eitt skriv, sum Faroe Jet hevði sent.

Hann sigur, at hansara sjónarmið er, at tá ið tað almenna keypir tænastur, har fleiri kappast um at veita, eigur tað almenna at velja tað loysnina, sum tænir okkum best í prísi og annars og tað gjørdi hann vart við.

- Vit eiga ikki at missa kappingina burtur við bara at brúka ein veitara mestsum automatiskt og har tað er ein fíggjarligur fyrimunur at brúka ein ávísan veitara, eiga vit at brúka hann.

Men eigur tú, sum partaeigari í Atlantsflogi ikki at heita á almennu umsitingina um at brúka títt egna felag?

- Nei, tað eigi eg ikki. Vit eiga eisini Føroya Tele, men samskiftið hava vit í Vinnumálaráðnum eisini boðið út og hava tikið av einum tilboðið frá Kalli.

Bjarni Djurholm sigur, at hetta málið er í tveimum.

- Vit eiga altíð at brúka skattgjaldarans pengar so skilagott sum gjørligt og tí áliggur tað okkum at brúka teir bíligastu veitararnar. Men vit halda eisini, at kapping er góð og tí eiga vit heldur ikki at taka grundarlagið undan kappingini við bara at brúka ein veitara av sær sjálvum. Sostatt eiga vit at brúka tann bíligara veitaran og í hesum sambandi merkir tað, at vit eiga at leggja okkum í geyma, at tað eru tvey flogfeløg.

Annars gjørdi tjóðveldisflokkurin nógv burturúr málinum í gjár og helt, at Bjarni Djurholm hevði lagt seg beinleiðis út í kappingina á loftmarknaðinum og royndi at minka um inntøkugrundarlagið hjá almenna felagnum, sum hann sjálvur varðar av.

Løgmaður dugdi ikki at síggja nakran trupulleika, tí tað einasta Bjarni Djurholm hevur gjørt, er at minna á, at tað eru tvey flogfeløg og at vit ikki eiga at velja tað felagið frá, sum hevur bestu treytirnar og tað hann ikki vera eitt órímiligt sjónarmið.

# Seinasta samgonga útihýsti Maersk

**Seinasta samgonga tók 100% Atlantsflog framum og útihýsti Maersk**

Tá ið Løgtingið týsdagin viðgjørdi leiklutin hjá Bjarna Djurholm í spurninginum um Faroe Jet og Atlantsflog vísti Jenis av Rana úr Miðflokkinum á, at tað, sum landsstýrismaðurin nú hevði gjørt, var fyri so vítt nýtt.

Tí hevur Bjarni Djurholm lagt seg seg út í hesi viðurskifti nú, gjørdi Tjóðveldisflokkurin tað eisini í undanfarnu samgongu.

Jenis av Rana vísti nevniliga á, at undanfarna samgonga hevði sanniliga tikið tað eina flogfelagið á Føroya rutuni framum hitt.

Miðflokkurin var í samgongu við Tjóðveldisflokkinum í undanfarnu samgongu og Jenis av Rana vísti á, at undanfarna samgongu tók 100% Atlantsflog framum hitt flogfelagið.

Tað var enntá frammi á Landsstýrisfundi í seinastu samgongu um at gera avtalu við Maersk um at flyta sjúklingar, men tað kundi ikki koma upp á tal, tí tann flutningurin átti ein part av lívinum í Atlantsflogi, segði Jenis av Rana.

Bill Justinussen, sum var landsstýrismaður í teirri samgonguni, váttar, at hann hevði tað frammi á landsstýrisfundi um at samráðast við Maersk um sjúklingaflutning í eini roynd at fáa prísin niður, men tað fekk hann ikki politiska undirtøku fyri.

Í teirri samgonguni var boðskapurin, at tann flutningin skuldi almenna føroyska flogfelagið hava.

Hann vísir á, at Almanna- og heilsumálaráðið sendir eini 1500 sjúklingar og 1000 fylgjarar av landinum um árið uttanlands við flogfarið í sjúkraørindum. Talan er sostatt um 2500 fólk um árið ella næstan sjey fólk hvønn einasta dag í árini. Tí er talan um rættiliga nógvan flutning og tann flutningin var undanfarna samgonga við tjóðveldisflokkinum, fólkaflokkinum, Miðflokkinum og sjálvstýrisflokkinum samd um at útihýsa annað flogfelagi á Føroya rutuni frá, tí tann flutningin skuldi føroyska felagið hava.

# Atlantic Airways seljast longu í vár

**– Alt bendir á, at Atlantsflog kann seljast longu í vár, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**

EINSKILJING

Áki Bertholdsen
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er alt, sum bendir á, at Atlantsflog kann seljast longu í vár.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Landsstýrismaðurin hevur fingið heimild frá Løgtinginum at selja 33% av Atlantsflogi og ætlanin var, at tey skuldu seljast nú.

Men eftir vanlukkuna í Stord í oktober, varð gjørt av at bíða við einskiljingini.

Tá ið Løgtingið umrøddi málið týsdagin, vildi Johan Dahl hava, at ein fastur dagur skuldi ásetast fyri, fyri, nær fyrsti partur í Atlantsflogi skuldi seljast.

Hann vísti á, at tilgongdin at einskilja Atlantsflog hevði verið leingi á veg, uttan at tað var klárt enn.

- Tað kann ikki vera vanlukkan í Stord, sum hevur ført til, at einskiljingartilfarið ikki hevur verið liðugt. Tí er neyðugt, at bólkurin, sum skal gera tilfarið, veit, at politiski myndugleikin andar hann í nakkan og tað kunnu vit gera við at áseta ein dag fyri, nær, alt skal vera liðugt.

### Verður helst selt í vár

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, helt ikki, at nøkur orsøk var til at seta nakra fasta dagseting.

- Tað er alt, sum bendir á, at tey fyrstu 33% av Atlantsflogi kunnu seljast í vár. Tað er hetta sum arbeiðsbólkurin metir og tað sama metir ráðgevarin, sum er Kaupthing.

- Tí er dagsetingin ongin trupulleiki.

Bjarni Djurholm segði, at tað er eisini alt, sum bendir á, at úrslitið hjá skaðanevndini í sambandi við vanlukkuna í Noregi, ikki fer at føra til seinkingar.

Hinvegin kann onki útihýsast og tað kann henda, at vit noyðast at bíða eftir endaligu frágreiðingini..

- Tað er ikki fyrrenn tey fyrstu 33% eru seld, at felagið verður listað og í síðsta enda er tað ICEX sum skal góðakenna um sølan kann vera í vár. Ella kann Icex krevja at bíðað verður eftir endaligu frágreiðingini.

- Men skuldi tað hent, at vit skulu bíða eftir endaligu skaðafrágráðingini, kann tað enda, at listingin ikki verður liðug fyrrenn síðst í 2007 ella fyrst í 2008.

Tí heldur landsstýrismaðurin, at dagsetingin skal takast burturúr fyri ikki at koma í ta støðu at noyðast aftur í tingið at biðja um loyvi til aftur at útseta søluna í nakrar mánaðir..

Hinvegin vissaði hann um, at tað er undir ongum umstøðum ætlanin at draga søluna út.

- Bæði Kaupthing og arbeiðsbólkurin arbeiða við tí setningi at avgreiða søluna sum skjótast, segði hann.

Ein høvusorsøk til at einskiljingartilfarið ikki er liðugt, er, at tað eru ymisk viðurskifti í sambandi við vanlukkununa, sum skulu við í tilfarið.

Men eftir tí, sum fyribils er í kortunum, fer hetta ikki at forða fyri, at 33% av Atlantsflogi kunnu seljast í vár.

Annars helt hann, at tað var best at Løgtingið hevði givið honum heimild at selja 66% av Atlantsflogi, soleiðis at 33% kundi seljast fyrst og so aftur 33% seinni, uttan at tað skuldi verið neyðugt at farið í Løgtingið einaferð afturat.

Men hann fekk bara heimild at selja 33% og tí má Løgtingið einaferð afturat samtykkja at geva honum heimild at einskilja 33% afturat.

Av tí sama var hann longu farin í holt við at fyrireika lógaruppskot, so hann kundi fáa heimild at selja tey næstu 33%.

- Men so hendi vanlukkan í Stord, har Atlantsflog misti eitt flogfar og tí var hetta arbeiðið lagt á hillina, legði hann afturat.